# TILTØK

**Gudstænastur**
**21. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Sonja Klein, altarg., – skriftamál kl. 10.40.
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Sverri Steinhólm
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Bergur D. Joensen. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini
***Kirkjubøur:*** kl. 12.30: Bergur D. Joensen. ***Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini.***
***Vestmanna:*** kl. 11.00, altarg., Marjun Bæk. ***Í Kollafjarðar kirkju gongur talvan fyri Bláa Kross Føroyar***
***Tjørnuvík:*** kl. 12.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen
***Hósvík:*** kl 12.00, altarg., Inga Poulsen Dam
***Skála:*** kl. 11.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Glyvrar:*** kl. 11.00, Meinhard Bjartalíð (útv.)
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, altarg., Martin R. Jacobsen (Talvan gongur fyri sunnudagsblaðið).
***Hvannasunds kirkja:*** kl. 12.00, altarg., Elsa Funding
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30 Elsa Funding
***Klaksvíkar Sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, Hans Eiler Hammer
***Sørvágur:*** kl. 11.00 altarg., David Johannesen
***Húsavík:*** kl. 12.00, altarg., Jákup R. Hansen
***Hvalba:*** kl. 18.00, Ólavur Rasmussen
***Fámjin:*** kl. 12.00, altarg., Jónsvein Bech

**Týskvøldið 18. september**
***Christianskirkjan:*** kl. 20.00 Konsert við Kor U.

**Kirkju og Missiónshúsið á Argjum**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 v/ Sólbjørg Símunarson.

**Sjómanskvinnuringurin**
kemur saman mánakvøldið kl. 20.00 á loftsstovuni í Kirkju- og Missisónshúsinum á Argjum. Mint verður á jólapakkarnar.

**Samkoman v/ Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini. Kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti/Uppbyggingarmøti.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og Bíbliugransking, kl. 11.00 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jens Wang um evnið »Eyðkenni úr lívi hins trúgvandi – fyrigevandi«. Kl. 11.30 er samvera við drekka. Kl. 12.00 á tilbiðjanarmøtinum talar Jógvan Z. um Rombrævið – tí Gud gav tey upp«.
Sunnudagsskúli kl. 12.00. Barnaansing undir møtinum.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti. Sunnudagsskúli kl. 14.00. Bøn kl. 17.30.
Heimaforbundið skipar fyri møtinum sunnudag kl. 18.00 Hjørdir Petersen talar. Drekkamuður aftaná møti. Øll eru vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti, Annika Berg talar.
Mánakvøldið kl. 20.00 »Vit koma saman« samvera og orð Guds við Elin og Hans Tausen, evnið hesuferð: Lívið við Kristusi«.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. www.gospel.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølinum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 15. okt. kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Fríkirkjan Oasan**
Fríggjakvøldið kl. 23.00 Bønarnátt. Bønarevnir kunnu ringjast ella sms'ast á tlf. 597597.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Martin Olsen. Sunnudagsskúli og barnakórið hava heystfrí.
Mánadagin kl. 20.00 Bønmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. www.ebenezer.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Øssur Berghamar. Eingin Sunnudagsskúli verður vegna heystfrí.
Mánadagin 17. oktober kl. 19.00 verður Betwix, ið er eitt tiltak fyri ung sum ganga í 5.-8. flokki. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Símun Joensen, Glyvrakórið syngur.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Alex O'Campo – ABC v/ Fríðtór Debes – evni: Hvat sigur Bíblian um at fasta, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin.
Mánadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15.0 í KFUK: Eldrasamkoman við Sólbjørg Símunarson. Evni: Haggai profetur.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Sverra Steinhólm og Bergur Debes Joensen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangel. møti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Jónhildu og Gulak Hansen úr Tjørnuvík, Thomas Juul Askham úr Havn, Jógvan Lamhauge úr Skopun o.ø.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Petur Zachariassen talar.
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Hjartaliga vælkomin.

**Miðvágslegan**
Bygdalegan verður í Nesvík í døgunum 18.-20. november.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Eingin sunnudagsskúli vegna heystfrítíð. Kl. 18.00 Møti. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ David Bech.
Kvøldbíbliuskúlin byrjar 19. okt. Høvi er at tekna seg til henda á tlf. 770073.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Dánjal av Rana.
Sunnudagin kl. 17.00 Familjumøti. Nátturði aftaná (øll taka við). www.keldan.fo

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00 Breyðbróting. Eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Á møtinum kl. 18.00 verður luttøka úr Kaldbak. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið í Søldarfirði**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti, Sólrun og Per Poulsen greiða frá ferð í Kina.

**Hæddin í Runavík**
Opið hús verður leygarkvøldið kl. 20.00 ymiskt á skránni.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangel. møti við sangi, vitnisburðum og talu, har Tórmund og fleiri luttaka og Herman og Gigga syngja.

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman í Kvinnufelagshúsinum mánakvøldið kl. 19.30. Mint verður á jólapakkarnar til sjófólki. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Barnakórið venur aftaná. Kl. 18.00 Møti, sum tey ungu skipa fyri.

**Kirkjukjallarin, Gøta**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00, Oggi Lamhauge luttekur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Sang- og vitnimøti og kl. 21.00 Ungdómsmøti har filmurin »Luther« verður vístur.

**Getsemane, Klaksvík**
Ungdómsmøtir vera í skúlanum á Fossánesi fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.30 við André Matras og Andreas Nýggjagarð.
Leygardagin kl. 16.00 er barnamøti í skúlanum á Fossánesi.
Sunnudagin kl.14.00 sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti.
Mánadag til fríggjadag kl. 6.15 er morgunbøn.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**KFUM og KFUK í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti – Ísraelstoymi greiður frá túri í Ísrael. Kl. 21.00 Ungdómsmøti við Ísraelstóymi hjá Heimamissiónini. Øll eru vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti – Libanon systrarnar luttaka.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00 v/ Fimmboga Poulsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18.00 Møti. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin er eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Kl. 17.30 Bønarmøti og kl. 18 Møti við Jónsvein Bech.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Møti verður sunnudagin kl. 18.00. Talarar Ásbjørg og Árni Kjærbeck.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 17.00 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 17.00 Familjumøti v/ Magnus Jensen, øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 20.00 Guitarskúli 12 ár og eldri.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bøn.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Kirstein og Noru Stórhamar.

**Betania, Sumba**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20.00, Nicolaus talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
2.-7. nov. fær Örkin vitjan av Jógvani Fríðrikssyni, presti o.ø. Í hesum sambandi verður møti, hugnakvøld og gudstænasta.
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.hotel-orkin.com

**Evangeliskir fundir í Danmark**
Leygarkvøldið kl. 19.00 Evangel. fundur í skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17.00 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyingafelagið í Århus**
Sunnudagsskúlin byrjar aftur í Áarstovu sunnudagin kl. 15. Á skránni verður barnasangur, bíbliusøga og spæl. Vit enda sum vant við einum drekkamunni. Øll eru vælkomin.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 16. oktober verður gongutúrur frá Vesturvarða í Havn til Suðurvarða. Farið verður av Kunningarstovuni **kl. 10.30.** Túrurin er lættur. Gingið verður uml. 3 tímar, minst til at hava góð og heit gonguklæðir og ein matpakka við. Tilmelding neyðug.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Mánadagin 17. oktober***
Fimleikur
***Týsdagin 18. oktober***
Prát og sangur. Vit spæla landastrok.
***Mikudagin 19. oktober***
Boccia
***Hósdagin 20. oktober***
Myndaskering
***Fríggjadagin 21. oktober***
Byrjandi enskt v/ Annette Gaardlykke.
***Sum nakað nýtt verður matgerð fyri pensionistar fyrrapart mikudag í Fløvanum v/ Varnu av Rana. Matgerðin er undir kvøldskúlaskipanini. Møguleiki verður eisini at koma til døgurða hendan dagin sum gestur. Kostnaður. Tilmelding á tlf. 448518 ella 222922.***

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

## Brúdleyp

Fríggjadagin 21. oktober giftast í Rødovre Kirke Kristine Dam Joensen, Argir og Thomas Andersen, Århus. Brúdleypsadr.: Gunnekær 37, 1 th. 2610 Rødovre.

Leygardagin 5. november giftast Bjørg Amalia Mohr og Julian Schantz Johnsson. Vígslan verður í Ørsted Landsbykirke kl. 15.00. Veitslan verður fyri innbodnum á Sonnerupgaard Gods, Tølløsevej 53, 4330 Hvalsø, kl. 19.00.

Leygardagin 12. november kl. 16.00 giftast í Viðareiðis kirkju Sólrun Sørensen, Viðareiði og Egin Fríði Ørvarodd, Sandur. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 451049, 451028 ella 361094 áðrenn 1. november.

Leygardagin 12. november kl. 14.00 giftast í Oyndarfjarðar kirkju Sølvá Árnadóttir úr Oyndarfirði og Jóhan Vest av Sandi. Vælkomst verður kl. 21.00 á Hotel Føroyum.

Leygardagin 26. november kl. 15.00 giftast í Glyvra kirkju Doretha Hansen, Runavík og Karstin Joensen, Klaksvík. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 448212, 456428 ella 220606 áðrenn 18. november.

## Vegna serligar umstøður

verður brúdleypið, ið verða skuldi 29. oktober hjá Rúnu Skouboe og Hjarnari Dalsgaard, útsett.

## Silvurbrúdleyp

Mánadagin 31. oktober hava Betty og Noel Joensen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum fríggjakvøldið 28. oktober kl. 19.00. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum hetta kvøldið, vera biðin um at siga frá á tlf. 457337, 222779, 475022 ella betty@ns.fo áðrenn 18. oktober.

Mánadagin 7. november hava Marjun og Virgar Hentze silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 19. november í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 423065 ella 224382 í seinasta lagi 12. november.

Mikudagin 9. november hava Malan og Regin Strømsten, Norðragøta, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 12. november kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið hetta kvøld, verða biðin um at siga frá á tlf. 441634 ella 281634 áðrenn 29. oktober.

## 80 ára føðingardagur

Týsdagin 18. oktober verður Kjartan Dalbúð, Fuglafirði, 80 ár. Dagurin verður hildin í Vesturstovu millum kl. 18.00-21.00